Kommunufelagið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn

Dagfesting
31. oktober 2023

Okkara j.nr.
23/06336-7

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.

**Viðv. u.t.ll. um málskúla fyri føroyskt sum annað mál**

Kommunufelagið hevur hesar viðmerkingar til omanfyrinevnda uppskot, sum varð sent okkum til ummælis hin 10. oktober 2023:

Felagið tekur sum útgangsstøði undir við at skipa hetta økið við lóg. Vit meta samstundis, at hetta økið hevur ein størri kompleksitet enn uppskotið tekur hædd fyri. Somuleiðis hongur økið neyvt saman við øðrum økjum, ið eisini vanta regulering – serliga innan integratións-, útlendinga- og arbeiðsmarknaðarmál.

Vit hava til dømis onga integratiónslóg, eins og ongar ásetingar eru um, hvussu arbeiðsgevarar og teirra útlendsku arbeiðstakarar skulu viðvirka til at integratiónin verður gjørlig í verki.

Tá ið hetta er nevnt, so eigur eitt slíkt arbeiði við málskúla eftir okkara tykki at byrja við einari heilt yvirskipaðari støðutakan til, hvør skal lyfta uppgávuna. Í hesum sambandi kemst ikki uttanum, at tað altíð hevur verið semja um, at landið tekur sær av allari vanligari og førleikagevandi undirvísing, og at kommunurnar skipa fyri frítíðarundirvísing.

Málundirvísingin er í grundini bert vorðin ein partvíst kommunal skipan, tí onki tilboð var frá landinum. Hetta er kortini ikki nøkur grundgeving í sær sjálvum fyri at institutionalisera hesa skipan í lógarverkinum. Man eigur heldur at hyggja eftir innihaldinum í tí, sum man her ætlar at skipa við lóg.

Innihaldsliga er ongin ivi um, at undirvísingin er av einum slíkum slagi sum hoyrir til landsins uppgávur. Tað er við øðrum orðum ikki ein kommunal uppgáva at skipa fyri málundirvísing.

Samstundis er tað landið, sum rindar fyri teir undirvísarar, ið taka sær av uppgávuni. Og sum vit lesa úr uppskotinum er tað eisini ætlanini – sum natúrligt er – at landið skipar og rindar fyri leiðsluna av skúlanum.

Tað er heldur ongin ivi um, at landið ræður yvir nóg mikið av fult hóskandi undirvísingarhølum á m.a. miðnámsskúlunum og Fróðskaparsetrinum til at kunna skipa praktisku viðurskiftini fyri skúlan.

Vísa avbjóðingar seg í verki við at skaffa neyðug høli, so er valla nøkur kommuna sum fer at nokta fyri at eitt undirvísingartilboð kann skipast í teirra øki. Heldur tvørturímóti, tí kann tøkur kapasitetur í kommunalum hølum nýtast til frama fyri lokalsamfelagið eru kommunurnar altíð jaliga sinnaðar.

Allar kommunur ynskja at skapa fortreytir fyri, at tilboð til borgarar teirra kunnu skipast so nær borgaranum sum gjørligt – og tískil er púra óneyðugt at krevja við lóg, at kommunurnar skulu viðvirka til hetta.

Undir slíkum umstøðum og fortreytum er ongin orsøk til at kommunurnar reint skipanarlaga skulu vera partur av málskúlanum.

Greiða sjónarmið okkara er tí, at landið eigur at taka stigið fult út við hesari lógini og átaka sær málskúlan allan sum hann er.

Okkara tilmæli er ikki borið av nøkrum illvilja móti málskúlanum, men heldur av einum ynski um at fáa røttu skipanina setta í verk fyri skúlan. Vit mæla staðiliga frá, at man skapar (enn) eina blandingsskipan millum land og kommunur.

Tað er als ikki neyðugt at kommunurnar skulu vera partur av málskúlanum og tað fer einans at leggja skipanarligar fótonglar fyri tey endamál, sum vit øll eru samd um at røkka við hesum máli.

Vil landsstýrið – ímóti okkara tilmæli – halda fast í tí skipan, sum er í uppskoti, so er okkara sjónarmið at hetta uppskotið í nógv størri mun eigur at verða til í einum samstarvi millum viðkomandi aðalráð, landsstovnar, kommunur og aðrar áhugapartar.

Reint praktiskt eigur hetta at bera væl til, tí fyriliggjandi uppskot kann ikki fáa gildi 1. januar 2024. Í fyrra lagi sæst ongin fígging vera í uppskoti í fíggjarlógini fyri komandi ár til at fremja ætlanirnar longu frá 1. januar 2024. Og í øðrum lagi er tíðin alt ov knøpp til – millum mangt annað – at skipa ein heilt nýggjan stovn og lyfta uppgávur úr kommunalu kvøldskúlaskipanini inn í eina nýggja skipan.

Vil landsstýrið ikki fylgja okkara tilmæli heita vit í staðin á aðalráðið um at nýta komandi mánaðirnar til at skipa eitt felags arbeiði við hesum viðurskiftum og síðani senda eitt tillagað uppskot í nýggja hoyring í fyrru helvt av 2024.

Vit mæla til, at eitt møguligt arbeiði av slíkum slagi tekur støði í viðmerkingunum frá Tórshavnar Kvøldskúla, ið helst hevur drúgvastu royndirnar í Føroyum við hesum viðurskiftum.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri